# Hósdagur 12. oktober

**ÚF**

7.00 **Tíðindi**
7.05 **Morgunlestur** - Sámal Petur Petersen í Funningi lesur
7.15 **Barnaløtan** - Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Morguntónleikur**
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Morgunrásin**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunrásin**
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fyrrapartsløg** - Gissur Patursson stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Suðar dýpið reyða** (e) - Vár Jacobsen lesur 5. part av skaldsøgu eftir Bergtóru Hanusardóttur
11.30 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Føroyar í dag** (e)
13.30 **Tónleikur**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Orðaskifti** (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Frívaktin** - Sending við tónleiki og práti um sjómanslív og slíkt. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Vangamyndin** - Annlis Bjarkhamar og Jóannes Miðskarð leggja til rættis
17.00 **Tíðindini**
17.05 **Í Víngarðinum** - Símun Jóannesarson Hansen stílar fyri
18.05 **Barnaløtan** (e) - Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Hetjur í skriftini - um Ádam** - Sending í røðini um hetjur í skriftini. Argmarð Arge leggur til rættis
19.30 **Harmonikutónleikur** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Løg mær dámar** - 3. sending hjá Jón Tyril
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Dagssetur** - Ginna Midjord leggur til rættis
22.00 **Rák** - Maria Abrahamsen stílar fyri
23.00 **Tíðindi**

**Lindin**

13.00 **Byrjan – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.25 **Lívgandi orð hesa vikuna**
13.30 **Sjómanssendingin Vitin** (e)
14.30 **Barnalindin**
17.00 **Ungdómssendingin »Get ready«** - v/ Rigmor og Rebekku
18.00 **Dagsins orð** eftir Svenning av Lofti
19.00 **Brot og bitar** - Eivind Bringsberg leggur til rættis
20.00 **Barnalindin** (e)
20.30 **Okkara dagliga breyð** (e)
20.55 **Dagsins orð** (e)
21.00 **Bønarlinjan við gesti** - Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20 á tlf. 321377, til ber eisini at senda fax nr. 321379 - Vertur: Dánjal á Dul Jacobsen
24.00 (umleið) **Vit gevast**

**Rás 2 FM 102 FM 107**

8.00 **Góðanmorguntónleikur -** Lættur blandaður tónleikur
9.00 **Kaffi** - Morgunsending við innsløgum, veðurlagnum, matarskránni o.ø.
9.45 **Orðið -** Bibliulestur v/Anju Hansen
10.00 **Leysaløtan** (e) - Frá degnum fyri
11.00 **Birgir Beinleiðis** - Beinleiðis sending við tónleiki og práti - Birgir Sondum leggur til rættis
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Lættur tónleikur**
13.00 **Leysaløtan** - Prát og innsløg v/ Ó. J. Rólantsson & Sonna Smith
14.00 **Ynskiløg** - Ring inn á tel. 359999, send eina heilsu og ynsk eitt lag!
15.00 **Tíðindi**
15.10 **Lættur tónleikur**
15.30 **Tað er tað!** (e) **-** Samrøðusending. Gestur er Annfinnur Zachariassen. - Oddur Hentze leggur til rættis
16.00 **Laila Beinleiðis** - Countrysending
17.00 **Barnarásin** (e)
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Lættur tónleikur**
21.00 **Tíðindi & Lýsingar**
21.15 **Orðið** (e) **-** Bibliulestur v/Anju Hansen
21.30 **Girlzone -** Beinleiðis ungdómssending við spurnarkapping - Ruth Reinert og Súsanna Clementsen leggja til rættis. - Telefon: 359999, fax 359990 ella E-mail: Girlzone@ras2.fo
24.00 **Góða nátt**

**SvF**

18.55 **Upp á lívið – Hjálp! eg eri upp á vegin**
19.20 **Seinastu búfólkini við Fossá** (e)
20.00 **Dagur og Vika við Grannum okkara**
20.50 **Ferðaliðið** 1:30 - nýggj donsk dramarøð - Óhóskandi fyri smábørn
21.50 **Ferðafrásøgn: Ísland og Grønland** - seinasta sending
22.35 **Krimitímin: Døtur** 2:2 - ensk krimirøð
23.25 **Kærleiki í 21. øld** - ensk kærleiksstuttrøð
23.45 **Liðugt**

**Eurosport**

7.30 **Golf**
8.30 **Cycling**
10.00 **Motorsports**
11.00 **Football**
13.00 Live - **Tennis**
14.30 Live - **Cycling**
16.00 **Tennis**
17.26 **News**
17.30 Live - **Tennis**
19.00 Live - **Tennis**
20.54 **News**
21.00 **Football**
23.00 **Motorsports**
23.30 **Trial**
0.00 **Truck Sports**
0.30 **Close**

**TV3**

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.05 **TV-shop**
8.50 **Knight Rider**
9.45 **Hvide Løgne**
10.15 **Horton-sagaen**
11.10 **Horton-sagaen**
12.05 **Melrose Place**
13.00 **Vild med dig**
13.25 **Panter-tanter**
13.55 **Det lille hus på prærien**
14.50 **Baywatch**
15.45 **Ellen**
16.15 **Ricki Lake**
17.10 **Dagens nyheder på TV3**
17.30 **Min kære familie**
18.00 **Alle tiders barnepige**
18.30 **Hvide løgne**
19.00 **Torsdagsbio: Stop! – eller min mor skyder**
20.40 **Kløcker og Vingsøe uddfordrer Amerika**
21.10 **Heksene fra Warren Manor**
22.10 **Dagens nyheder på TV3**
22.20 **Seinfeld**
22.50 **Sports Night**
23.20 **Simpsons**
23.50 **Vore værste år**
0.20 **Ti tommelfingre**
0.50 **Mike Hammer**
1.45 **Caroline, karrieren og kærligheden**
2.40 **T. J. Hooker**
3.35 **Godnat**

**BBC WORLD**

0.00 **BBC News**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **BBC News**
1.30 **Holiday**
2.00 **BBC News Special – US Presidential Debate**
4.00 **BBC News**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **BBC News**
5.30 **Top Gear**
6.00 **BBC News**
6.30 **The Money Programme**
7.00 **BBC News**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **BBC News**
8.30 **Talking Movies**
9.00 **BBC News**
9.30 **The Money Programme**
10.00 **BBC News**
10.30 **HARDtalk**
11.00 **BBC News**
11.30 **Holiday**
12.00 **BBC News**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **BBC News**
13.30 **HARDtalk**
14.00 **BBC News**
14.15 **World Business Report**
14.30 **Top Gear**
15.00 **BBC News**
15.30 **The Money Programme**
16.00 **BBC News**
16.30 **Asia Today**
17.00 **BBC News**
17.15 **World Business Report**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **BBC News**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **BBC News**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **BBC News**
20.30 **Click Online**
21.00 **BBC News**
21.30 **World Business Report**
22.00 **BBC News**
22.30 **Panorama**
23.00 **BBC News**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

**BBC PRIME**

0.00 **TLZ: »The Promised Land – Any Place but Here«**
1.00 **TLZ: »White Heat – Repeat after Me«**
2.00 **TLZ: »Bajourou - Music of Mali«**
2.30 **TLZ: »Child's Play«**
3.00 **TLZ: »Open Advice - Staying on Course«**
3.30 **TLZ: »A Formidable Foe«**
4.00 **TLZ: »Isabel – Princesa«**
4.20 **TLZ: »Spanish Globo – La fiesta«**
4.25 **TLZ: »Spanish Globo – De vacaciones«**
4.30 **TLZ: »The Experimenter«**
4.50 **TLZ: »The Small Business Programme«**
5.30 **TLZ: »Kids English Zone – Animals«**
6.00 **SuperTed**
6.10 **William's Wish Wellingtons: »Pirate William«**
6.15 **Monty the Dog: »Monty at the Park«**
6.20 **Playdays: »The Playground Stop«**
6.40 **Bright Sparks**
7.05 **The Really Wild Show**
7.30 **Celebrity Ready, Steady, Cook**
8.00 **Style Challenge**
8.25 **Real Rooms**
8.55 **Going for a Song**
9.30 **Top of the Pops Classic Cuts**
10.00 **Antiques Roadshow**
10.30 **TLZ: »Horizon – Fermat's Last Theorem«**
11.30 **As the Crow Flies**
12.00 **Celebrity Ready, Steady, Cook**
12.30 **Style Challenge**
13.00 **Doctors: »Second Chance«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Real Rooms: »Islamic Kitchen«**
14.30 **Going for a Song**
15.00 **SuperTed**
15.10 **William's Wish Wellingtons: »Pirate William«**
15.15 **Monty the Dog: »Monty at the Park«**
15.20 **Playdays: »The Why Bird Stop«**
15.40 **Bright Sparks**
16.05 **The Really Wild Show**
16.30 **Wallace and Gromit: »The wrong Trousers«**
17.00 **Changing Rooms**
17.30 **Doctors: »Sins of the Mother«**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Rolf's Amazing World of Animals**
19.00 **Wallace and Gromit: »A Close Shave«**
19.30 **Murder Most Horrid: »He Died a Death«**
20.00 **Jonathan Creek: »Danse Macabre«**
21.00 **French and Saunders**
21.30 **Top of the Pops Classic Cuts**
22.00 **The Missing Postman**
23.15 **The Sky at Night: »Cosmic Fireworks«**
23.35 **Dr. Who: »Castrovalva«**

***ÚF – Hósdagur kl. 19.00:***

## Hetjur í skriftini – um Ádam

Sagt verður í Skriftini, at Adam var fyrsta menniskja. Adam merkir jørð, leirur og sagt verður, at Guð skapti hann úr mold. Seinni gjørdi Hann so Evu av rivjabeininum hjá Ádami. Síðani kundu tey liva eitt sera gott liv í vakra havanum, Eden. Tey fingu bert eitt forboð. Hildu tey ikki tað, so fekk tað avleiðingar.

***SvF – Hósdagur kl. 20.50:***

## Ferðaliðið 1:30

– Nýggj donsk dramarøð.

Samstundis sum Ferðaliðið hevur endað eina væleydnaða kanning onkunstaðni í Danmark, fáa tey fimm kriminalfólkini óvæntað til uppgávu, at greina eina syrgiliga brotsgerð innanhýsis í løgregluni.

Tá leiðslan hjá Ríkis-løgregluni samstundis verður noydd til at gera nakrar umrokeringar í hesum lítla bólkinum, sum annars altíð arbeiðir saman, gerast tey ill og siga sína hugsan um støðuna. Hetta verður eitt mál, sum fær stórar avleiðingar, ikki bara innanhýsis í bólkinum, men eisini heima við hús hjá tveimum teirra.

Leikarar: Charlotte Fich, Waaage Sandø, Lars Brygman, Mads Mikkelsen, Trine Pallesen, Erik Wedersøe o.o.

Leikrit: Stig Thorsboe og Peter Thorsboe.

Leikstjórn: Niels Arden Oplev.

***SvF – Hósdagur kl. 21.50:***

### Ferðafrásøgn:

## Ísland og Grønland

Nú hóskvøldið vitjar Ian Wright Ísland og Grønland og hetta er samstundis seinasta sending í hesi røðini.

***TV3 – hósdagur kl. 19.00***

### Torsdagsbio:

## Hybridmanden



Amerikanskur skemtifilmur frá 1996 (The Cable Guy)

Steven Kovacs verður tveittur út av unnustu síni, so hann má finna sær eitt nýtt stað at búgva. Tað eydnast og fyri at fáa bíligt kaðalsjónvarp, letur hann sum um, hann er áhugaður í spannandi arbeiðnum hjá kaðalleggjaranum Chip Douglas og gevur honum 50$ í hondina fyri at leggja kaðalin inn í húsið. Chip veit tó ikki av, at hann við hesum eisini hevur keypt sær ein nýggjan vin – um hann vil tað ella ikki.

Skjótt vil Steven ikki kennast við Chip longur, og hann kvettir sambandið teirra millum. Hann sleppur tó ikki so lætt av við Chip, og skjótt verður lív hansara ein sonn marra.

Leikarar: Jim Carrey, Matthew Broderick og Leslie Mann.

Leikstjórn: Ben Stiller.

***TV3 – hósdagur kl. 20.45:***

## Kløcker og Vingsøe bjóða Amerika av



Spennandi ferðasending við Mai-Britt Vongsøe Watt og Jørgen Kløcker. – »Wild West«

Ævintýrararnir Jørgen Kløcker og Mai-Britt Vingsøe bjóða hesu ferð tí villa vestri av á eini veruligari kovboy-ransj.

Jørgen leypir út sum neytadrongur og bjargar við neyð og deyð lívinum, tá stevnir móti avgrundini við fúkandi fer liggjandi á einum rullifjøl. Mai-Britt má drekka fimm litrar av vatni, tá hon fer á fjallasúkklu í oyðimørkini, har hitin er 50 stig. Hon skýtur tó ikki seg sjálva í fótin, tá hon luttekur í skotkapping.

***TV3 – hósdagur kl. 21.15:***

## Heksene fra Warron Manor

Amerikansk dramarøð

Fyrrverandi drongurin hjá Phoebe vitjar hana aftur í tí vón, at tey kunnu koma saman aftur, og hann biðjur hava um at selja eina øskukrukku, sum ikki bara er stolin, men eisini bannsett. Hetta vísir seg at vera eina vandamikil støða.

Piper roynir at nýta gand sín fyri at finna ein ein drong.







Viðmerkingar

# Er barnaansingin bara valagn?

**Her prenta vit røðu, sum Leivur Hansen, býráðsformaður, helt í sambandi við pallborðsfundin í Norðurlandahúsinum, sum Foreldrafelagið skipaði fyri**



Hetta er heitið á pallborðsfundinum, sum Foreldrafelagið skipar fyri her í kvøld í sambandi við býráðsvalið seinni í heyst.

Felagið sipar við hesum eftir øllum at døma til, at ov lítið samsvar er millum tað, ið framt er á hesum øki, og tey gyltu vallyftini, ið givin vóru fyri fýra árum síðani.

Og veitst tú ikki betur, ja, so kanst tú - tá tú lesur tað, ið Foreldrafelagið setur uppá prent - tíverri illa koma til aðra niðurstøðu enn hana, at at kalla onki hevur verið ella verður gjørt fyri at fáa bilbugt við henda stóra trupulleika.

Men sjálvandi er hetta ikki so - og tað vita eisini tey, ið hava fylgt bara eitt lítið sindur við í tí menning og framburði, ið veruliga er farin fram á hesum øki seinastu árini.

### 400 nýggj pláss

Her hjá mær havi eg liggjandi eitt yvirlit, sum svart uppá hvítt vísir, hvussu mong nýggj ansingarpláss eru komin aftrat higartil í hesum valskeiðnum.

Og hvussu mong koma aftrat í heyst og hetta til næsta summar.

Samlaða talið - fyri at taka tað fyrst - er útivið fýrahundrað.

Lat meg fyrst nevna tey nýggju plássini, ið longu eru komin aftrat sum úrslit av ný-, út- og umbyggingum:

Hesi eru:

Útibarnagarðurin í Havnardali 20 pláss, Býlingshúsið Vesturi á Flat 20 pláss, Býlingshúsið Undir Fjalli 20 pláss, Dagstovnurin á Argjum 10 pláss, Lítliskógur 10 pláss og Býlingshúsið Inni á Gøtu 60 pláss.

Hetta gevur 140 nýggj pláss.

Í november letur Útibarnagarður upp í Framhúsinum í Gundadali, har pláss verður fyri 16 børnum.

Í sama mánað letur Útibarnagarður upp í gamla skúla á Hvítanesi - somuleiðis við plássi fyri 16 børnum.

1. januar letur Útibarnagarður upp í skótahúsinum hjá SSB. Har fáa 20 børn innivist.

Í vetur sleppa eisini 20 børn aftrat inn í býlingshúsið Millum Gilja, og 20 børn sleppa aftrat inn í býlingshúsið á Ternuryggi.

Fyrsta dagin verður spaki settur í jørðina fyri nýggjum dagstovni úti við Landavegin (í Øksnagerði) til 60 børn.

Og ein fyritøka her í kommununi er sum tann fyrsta í landinum í ferð við - í samráð við kommununa - at leita eftir einum hóskandi húsi til barnagarð, ið skal hýsa umleið 30 børnum.

Hesar ítøkiligu ætlanir, eg her havi reksað upp, útvega í minsta lagi 182 pláss aftrat.

Saman við teimum 140 plássunum, ið frammanundan eru komin aftrat, er talan altso um 322 nýggj pláss tilsamans.

Tá eru tey stívliga hálvthundrað børnini, ið dagrøktin væntandi økist við í næstum í sambandi við broytingarnar, ið gjørdar eru har á økinum, ikki íroknaði.

Verða tey tað, fer samlaða talið at tátta í 400.

### Frítíðarskúlin eisini víðkaður

Men tá eru heldur ikki tey 150 børnini, sum Frítíðarskúlin er øktur við í hesum sama tíðarskeiði - og tey hálvthundrað, sum ætlanin er skulu fáa innivist har aftrat næsta ár - íroknaði.

Verða tey tað - og tað eiga tey sjálvandi, tí hetta hevur eisini við ansing at gera - er talan um ein vøkstur í talinum á nýggjum barnagarðs- og Frítíðarskúlaplássum uppá - ja, haldið tykkum fast! - útivið sekshundrað tilsamans.

Hetta eru tøl, ið tala!

Og við hesum tølum í hondini ber væl og virðiliga til at vísa aftur uppáhaldi Foreldrafelagsins um, at barnaansingin bara er valagn.

Nei, veruleikin er, at tað hevur eydnast kommununi at fingið nógv meira á skaftið á hesum økinum, enn nakar hevði torað at droymt um og enn minni væntað fyri fýra árum síðani.

Hetta sæst eisini við at sammeta talið á nýggjum plássum við tilmælið í Álitinum um barnaansing, ið varð latið úr hondum á heysti 1996.

Tá - fyri einans fýra árum síðani - mettu tey, ið gjørdu hetta álitið, at 30 nýggj pláss um árið møguliga fóru at røkka til at náa málinum um ansingartrygd (passningsgaranti) her í kommununi ár 2006.

Í øðrum lagi varð mælt til, at útbyggingin á hesum økinum skuldi fylgja tørvinum.

Men ongin droymdi tá heldur um, at vit fóru at uppliva slíkan fólkavøkstur, sum vit hava gjørt. (Vøksturin samsvarar við fólkatalið í Vestmanna - t.e. millum 1200 og 1300 fólk!).

Hetta merkist sjálvandi, men fjalir kortini ikki út yvir tann veruleika, at tað hevur eydnast at útvegað væl oman fyri 100 nýggj pláss í meðal um árið hetta tíðarskeiðið.

### Órealistiskt útspæl

Kortini er tað ein sannroynd, at vit framvegis hava ein bíðilista við meira enn 400 børnum á.

Og hetta er sanniliga líka frustrerandi fyri okkum í býráðnum sum fyri tykkum foreldur, ið orsakað av hesi ólukkuligu støðu ikki sleppa til arbeiðis - við teimum harav standandi avleiðingum.

Tað gongur snøgt sagt ikki dagur, at spurningurin um, hvat ið er til ráða at taka, sveimar uppi yvir okkum.

Hóast ymisk á máli, so haldi eg meg kunna siga - vegna okkum øll, ið her sita - at vit eru samd um ikki at helma í, fyrrenn rætturin at fáa børn í ansing er vorðin líka so sjálvsagdur og natúrligur sum rætturin at fáa børn í skúla.

Men at vit fáa loyst trupulleikan longu innan trý ár, soleiðis sum sosiala nevnd hevur lagt upp til, loyvi eg mær at ivast stórliga í. Satt at siga haldi eg hetta vera púra órealistiskt.

So skal ið hvussu er ein heilt annar lútur til enn hann, ið nevndin mælir til at brúka - og sum nóg illa røkkur til at nøkta verandi tørv, tí als onki røkist fyri, at fólkavøksturin her í kommununi verður minni komandi árini enn undanfarin ár.

Vit mugu eisini vera somikið at okkum komin at hava í huga, at trøini ikki vaksa inn í himmalin. Heldur ikki hjá einari - at síggja til - so múgvandi kommunu sum Tórshavnar komunnu.

Hóast nógvur peningur rennur inn í kassan, so rennur sanniliga eisini nógv úr honum aftur - og hetta setur sjálvandi sínar avmarkingar.

Og ikki tykkum at siga, so hevur kommunan eisini hópin av øðrum málum at stríðast við í kjalarvørrinum av búskaparkreppuni, ið ikki kann sigast at vera heilt avhasað enn.

Men sum fyrr nevnt: Tað er tað rong og villleiðandi tala at siga, at tað hevur skortað við vilja frá býráðsins síðu at fáa loyst hetta álvarsmál.

### Ótraditionellar loysnir neyðugar

Tá hetta býráðið tók við 1. januar 1997 stóðu slakar 24 miljónir krónur á fíggjarætlanini til barnaansing. Hetta svaraði til 9 prosent av teimum 228 miljónunum, sum fíggjarætlanin tá javnvigaði við.

Í ár standa 54 miljónir krónur á fíggjarætlanini til barnaansing av 339 miljónum krónum. Tað svarar til 16 prosent.

Næsta ár verða ikki færri enn 77 miljónir krónur settar av á fíggjarætlanini til barnaansing, svarandi til meira enn 20 prosent av ætlaðu fíggjarætlanini.

Fyri rættvísisins skyld skal viðmerkjast, at kommunan samstundis hevur spart 17 miljónir krónur í gjøldum til landskassan fyri sín part av pensjónum, forsorg o.ø., sum landið nú hevur yvirtikið. Hetta er 5 prosent av verandi fíggjarætlan.

Haraftrat kann verða lagt aftrat, at landsmyndugleikarnir longu í fjørvár boðaðu frá, at teirra partur av kostnaðinum til ansing av børnum ikki fór at verða hækkaður, men læstur fastur á 59 miljónum krónum.

Hetta bar í sær, at kommunan tók sakina í egnar hendur og avgjørdi at útbyggja barnaansingina fyri egna ábyrgd og rokning.

Fyrsta „skotið“ undir nýggju treytunum var býlingshúsið Inni á Gøtu, sum kommunan bar størsta partin av rakstrinum av.

Tað, sum síðani er og verður bygt, er fyri kommununnar egnu rokning.

Eitt, sum vónandi fer at bøta um støðuna á barnagarðsøkinum - umframt tey tiltøk, kommunan sjálv setur í verk - er, um fleiri stovnar og fyritøkur fara at seta á stovn sínar egnu barnagarðar í samstarvi við kommununa.

Eitt annað, sum vónandi eisini fer at hjálpa, eru broytingarnar á dagrøktarøkinum og sum longu nú hava havt við sær, at 239 børn nú eru inni í dagrøktarskipanini ímóti 218 fyri bert fáum vikum síðani.

Greitt er, at skulu vit røkka málinum at útvega øllum børnum stovnspláss, so er eisini neyðugt við alternativum loysnum - og tí mugu og skulu vit vera opin fyri hesum møguleikum.

Meg minnist, hvussu ivasom mong vóru, tá útibarnagarðurin í Havnardali fyrstu ferð varð tikin upp á tungu sum ein alternativ loysn. Í dag munnu tey flestu sanna, at hetta alternativið er og hevur verið eitt sera væleydnað tiltak.

Hetta er eisini orsøkin til, at aðrir útibarnagarðar nú stinga seg upp sum hundalond. Ikki sum discountloysnir, sum Foreldrafelagið vil vera við, men sum góðar vælvirkandi loysnir, ið hava fingið bláa stemplið frá stovnsleiðarum.

### Hugsið um dygdina

Í øllum hesum meldrinum - og samstundis sum arbeitt verður við bæði nýggjum og tradisjonellum loysnum - er tað ógvuliga umráðandi, at vit allatíðina hava dygdina, kvalitetin, frammarlaga í huga - bæði hvat kvalifiseraðum meðarbeiðarum og hølisviðurskiftum viðvíkur, soleiðis at børnini fáa ta røkt og umsorgan, tey hava uppiborið.

Tjóðveldisflokkurin hevur havt ein aktivan leiklut á barnaansingarøkinum her í kommununi upp gjøgnum árini - ikki minst í hesum valskeiðnum - og eg kann vissa tykkum um, at tit róliga kunnu líta á, at hann eisini verður við í fremstu røð á hesum øki í tíðini, ið kemur.

Er barnaansing bara valagn?

Gerið so væl og dømið sjálvi!

Takk fyri!

**Leivur Hansen**

## Viðmerkingar til Fólkafloksumboðini í Tórshavnar Býrað – Fjarhitafelagið



Tað er at undrast á, at býráðsumboðini hjá Fólkaflokkinum ynskja at fáa eina fráðgreiðing um P/F Fjarhitafelagið til komandi býráðsfund tann 5. oktober.

Grundgevingin hjá teimum er: *Við tað, at ein sera stór misnøgd er millum teir borgarar í kommununi, ið eru knýttir at fjarhitaskipanini, ynskja býráðslimirnir fyri fólkaflokkin at fáa ein nágreiniliga frágreiðing um viðurskiftini millum brúkararnar og fjarhitafelagið.*

Teir siga víðari*: Tá býráðið stendur sum eigari av helvtini at P/f Fjarhitafelagnum, má tað vera rætt og rímuligt, at býráðslimir eru væl kunnaðir um viðurskiftini í fjarhitafelagnum, serliga um samskiftið millum brúkararnar av fjarhita og felagið ikki er nøktandi*.

Tá tit nevna, at tað er rímuligt at býráðslimir verða væl kunnaðir og at P/F Fjarhitafelagið ikki er nøktandi, eri eg sera bilsin. Tann kunningin tit eftirlýsa eigur at koma frá tykkara egnu umboðum og at felagið ikki er nøktandi, tað er eisini tykkara egnu umboð, tað er bara folkaflokkurin sum hevur tvey umboð í Fjarhitafelagnum.

Í dag sita Petur Olsen og Páll Petersen í nevndini fyri P/F Fjarhitafelagið, báðir valdir av fókaflokkinum og hevur Páll Petersen, býraðslimur eisini verði næstformaður í P/F Fjarhitafelagnum, Páll Petersen hevur siti í nevndini í fleiri ár,

At Jan Christiansen og Hjørleif Kúrberg ynskja eina fráðgreiðing, er onki løgið í, men at Páll Petersen ynskir at fáa eina fráðgreiðing um seg sjálvan, tað undrar meg almikið.

Góðu tit tríggjir Jan, Hjørleif og Páll, hevði tað ikki verði meira sømuligt, tá tit nú sjálvir hava alla tað ávirkan í tit ynskja í P/F Fjarhitafelagnim, at kalla inn til fundar á vanliga hátt, heldur enn at blása hetta mál upp.

Tykkara viðring fyri nevndini í P/F Fjarhitafelagnum og tykkara egnu umboðum, er á einum sera lágum støði.

Til síðst kann nevnast, at allir býráðslimir eru bodnir við til teir aðalfundir í hava verði hjá P/F Fjarhitafelagnum, tvs. eina ferð um árið. Á hesum aðalfundum kunnu allir ivaspurningar til nevndina reisast og kunnu eisini nevndarlimir í P/F Fjarhitafelagnum koma til orðana, eisini tykkara umboð.

Vinarliga

**Schumann Hjaltlin, býráðslimur**